# Anna skal syngja »Whatever Happens«

Tá X-Factorluttakararnir í annaðkvøld fara at heiðra Michael Jackson, fer Anna Nygaard at syngja »Whatever Happens«. Tað er nú meira enn eitt hálvt ár síðani, at Michal Jackson doyði av hjartatilburði, og nógv listarfólk kring heimin hava gjørt mangt og hvat fyri at heiðra minni hansara. Í annaðkvøld verða tað teir átta luttakararnir, sum eftir eru í X-Factorkappingini hjá Danmarks Radio, sum fara at heiðra poppkongin við bert at syngja løg hjá honum. Sambært Ekstrablaðnum, so fara teir átta luttakararnir at syngja hesar Michael Jackson-sangir: Luttakararnir hjá Remees: Jesper: »Say Say Say« Anna: »Whatever Happens« Tine: »Earth Song« Luttakararnir hjá Pernille: Thomas: »Man in the Mirror« Daniel: »Black or White« Luttakarnir hjá Soulshock: In-Joy: »Remember the Time« 8210: »Wanna Be Startin« Somethin» The Fireflies: »Human Nature« Lagið »Whatever Happens« hjá Annu er av »Invincible« útgávuni hjá Michael Jacobsen 2001.



*Anna Nygaard saman við foreldrunum, Kenneth og Mette Nygaard, tá fyrsta beinleiðis X-Factorsendingin var seinasta fríggjakvøld*
*Mynd: Danmarks Radio*



*- Longu nú er eydnast at gera orkudepilin á Kambsdali til ein depil fyri menning og ráðgeving um varandi orku, sum tað er áhugavert hjá ymiskum pørtum í øðrum londum at samstarva við. Kambsdalur skal verða ein depil fyri eini líðandi flyting av orkunýtsluni yvir á varandi orku. Vit byrja í tí smáa og vilja røkka málinum í samstarvi við restina av samfelagnum – og í samstarvi við útlendskar partar, sigur Eyðun Lauritsen*
*Mynd: Pætur Joensen*

draga føroyskar fyritøkur inn í eitt millumtjóða samstarv, og tí verður hetta eisini ein virkin vinnumenning, sum fer at koma samfelagnum at gagni, leggur hann aftrat.

## Orkupolitikkur

Í tilfarinum, sum Eyðun Lauritsen hevur sent okkum, vísir hann eisini á ein orkupolitikk, har miðjað verður eftir, at Føroyar í framtíðini skulu gera seg óheftar av oljunýtslu á landi.

- Hetta er eyðsýnt, tí oljuprísurin hækkar, soleiðis at tað verður ov dýrt at brúka olju - og tí, at vit eins og øll onnur lond í heiminum skulu minka um $CO_2$-útlátið.

Hann heldur, at um vit taka hesi stig seinni enn hini londini, verða vit framhaldandi millum tey lond, sum noyðast at gjalda høga oljuprísin.

- Ein stór avbjóðing fyri framman er, hvat skal verða í staðin fyri oljuna. Orkunýtslan kann og skal minkast munandi við at spara orku. Nýggja byggilógin kemur at broyta føroyska bygging munandi, soleiðis at orkunýtslan í nýggjum húsum verður munandi minni, enn hon er í dag. Men hóast orkusparingar, verður altíð tørvur á orku til upphiting, el og tól av ymiskum slagi og til flutning.

Eyðun Lauritsen vísir á, at orkutørvurin er vaksandi, hóast alt verður sett inn til at spara orku.

- Hesin orkutørvur skal nøktast við varandi orku, og Føroyar hava nógvan vind, sjóvarfall, aldu, sól og regn. Sum onnur alternativ, kann tari eisini alast og gagnnýtast til orku. Avbjóðingin er at gagnnýta allar hesar keldur, soleiðis at orkan er tøk, tá tørvur er á henni.

Hann vísir eisini á, at vatnorka er kend tøkni og kann goymast, til tørvur er á henni. Mark er tó fyri, hvussu nógv vatn kann goymast, og tí er eisini mark fyri, hvussu nógv vindorka, umvegis pumpuskipanir, kann goymast á henda hátt.

## Hvat krevst?

Eyðun Lauritsen sigur, at skulu Føroyar hava ein reinan orkubúskap, krevur tað, at vit 1) gagnnýta varandi orku og menna tøknina, ið ger tað møguligt at fáa sum mest burturúr tilfeinginum, 2) menna samanspælið millum varandi orku og bygningar, soleiðis at húsini sjálvi kunnu gerast orkuframleiðarar, tá tað er í bygningum, at mesta orkan verður nýtt, 3) menna førleikan at goyma og flyta orku, soleiðis at varandi orka kann fáast til høldar, tá hon er tøk og er tøk, tá tørvur er á henni og 4) menna samspælið millum orkuframleiðslu og orkunýtslu við kunningartøkni, soleiðis at orkunýtslan kann stýrast eftir, hvussu nógv orka er tøk.